## Castro kemur ikki

Nógvir ríkis- og stjórnarleiðarar koma til Keypmannahavnar seinni í vikuni á veðurlagsráðstevnu, men kubanski forsetin, Raul Castro, kemur ikki, og hann fer heldur ikki at senda nakran fyri seg. Orsøkin er, at sambært kubanska forsetanum er ráðstevnan í Keypmannahavn eitt stórt mistak, og hann hevur mælt sínum vinstrasinnaðu starvsbrøðrum í Latínamerika til at finna egnar loysnir at loysa trupulleikarnar við veðurlagnum við. Áheitanin frá Raul Castro kom á einum fundi í Havana í gjár, har níggju lond í Latínamerika umrøddu handilssamatarv.



## Krónan í søguna

Hevur Bo Overvard, búskaparfrøðingur hjá banka- og tryggingarfelagnum Alm. Brand rætt, fer danska krónan í søguna um knappliga tvey ár. Bo Overvard væntar, at spurningurin um danska luttøku í evrusamstarvinum kemur til fólkaatkvøðu næsta heyst. Tá fara danir at siga ja, og eitt gott ár seinni fer krónan so í søguna. Tað merkir, at evran kemur ístaðin fyri krónuna nýggjársdag í 2012, sigur Bo Overvad við DR. Hann ivast ikki í, at skifti frá krónuni til evruna hevði verið gagnligt fyri tann danska búskapin.



*Flaggskipið hjá klaksvíkingum Norðborg landar í Ánunum. Veiðivirðið á hesum sildatúri liggur millum 14 og 15 miljónir krónur. – Hetta var ein fínur túrur, sigur reiðarin, Kristian Martin Rasmussen*

*Mynd: Dávur Winther*

Kristian letur annars væl at gongdini, síðan Norðborg byrjaði fiskiskap, og hann heldur, at raksturin við verandi gongd fæst at hanga saman.

- Eg tími ikki so væl at tosa um tøl, men hetta sær bara heilt hampiligt út, leggur hann aftrat.

### Tvær linjur aftrat

Kristian Martin Rasmussen sigur, at skipið ætlandi verður lagt í einar 2-3 vikur um jólahøgtíðina, har ætlanin er at rætta upp á nøkur ting.

- Vit fara eisini at seta tvær nýggjar flakamaskinur í skipið, soleiðis at hesar í staðin fyri at vera sjey, nú verða níggju í tali.

Reiðarin sigur, at teir eiga maskinurnar, sum teir keyptu frá P/F Nærabergi.

- Vit keyptu tvær góðar linjur frá felagnum, og tað eru hesar, sum nú skulu setast í skipið aftrat.

Hann vísir á, at allar níggju linjurnar, sum verða í skipinum, tá tað loysir aftur tíðliga í komandi ári, fara at hava vacum-súgving.

- Í dag hava bert tríggjar av maskinunum henda møguleika, men tá loyst verður aftur, skulu allar níggju maskinurnar súgva magan úr fiskinum. Hesar maskinurnar skulu brúkast, tá skipið er á svartkjaftaveiði, og svartkjafturin verður avhøvdaður ella skráskorin.

Kristian Martin vísir á, at skrædlarar eru til tríggjar av teimum sjey maskinunum, men tá loyst verður aftur, verður skrædlari til allar maskinurnar.

- Hetta er tað, sum í høvuðsheitum skal gerast, og endamálið við broytingunum er at økja um framleiðsluorkuna.

Kristian Martin sigur, at vacum-súgvingin og skrædlarar, sum skulu setast í skipið, koma heim til Føroya til jólar, og síðan fara tríggjar smiður í Klaksvík at gera arbeiði fyri felagið.

### Genta umborð

Manningin umborð á Norðborg liggur millum 27 og 30 mans á hvørjum túri.

Øll manningin er mannfólk undantikið ein 18 ára gomul genta, Elspa, sum er abbadóttir Kristian Martin og dóttir Jón Rasmussen, skipara.

- Hetta er triði túrurin hjá henni. Hinar báðar fyrru var hon á verksmiðjuni, men hendan túrin er hon 2. kokkur umborð, sigur reiðarin, Kristian Martin Rasmussen.